## DAGSINS MEINING

# Globaliseringin og Fíggjarmálaráðið

Fíggjarmálaráðið hevur í umbúnað at gera eina lógarbroyting, eftir at tað var staðfest, at undir núverandi lóggávu hevur Toll og Skatt ikki rætt til at krevja MVG frá útlendskum fylgisveinasjónvarpsfeløgum sum til dømis Canal Digital.

Fíggjarmálaráðið arbeiðir altíð skjótt, tá tað handlar um, at onkur borgari ella okkurt felag skal gjalda meira. Spell at sama ráð ikki ger líka skjótt av, tá tað snýr seg sum at fáa meira smidligar skipanir í lag bæði fyri einstaklingar og vinnu her í Føroyum og ikki minst í samband við samhandil við útheimin. Hvar blíva til dømis lovaðu dupultskattasáttmálarnir av?

Í tí aktuella málinum um MVG á fylgisveinasjón-varp hevur Fíggjarmálaráðið partvíst grein í sínum máli. Tað er sjálvandi órímiligt at fylgisveinasjón-varp gjøgnum Føroya Tele skal gjalda MVG, meðan ein útlendskur veitari skal sleppa undan. Men kanska kundi man brúkt eitt sindur meira hugflog enn bara at víðka MVG innkrevjanina.

Hvørji eru framtíðarperspektivini, um man vil krevja MVG av fylgisveinatænastum úr útlandinum? Tað digitala sjónvarpið verður um nøkur ár ikki bert undirhald, men kann potentielt gerast eitt samskiftistól, ið ikki hevur sæð sín líka fyrr. Hvussu við tænastum úr útlandinum yvir internetið? Um fylgisveinatænastur skulu gjalda MVG, so má vælsaktans eisini gjaldast MVG, skuldi ein føroysk fyritøka keypt sær ráðgeving, kunning ella aðrar tænastur yvir internetið. Hesar tænastur fara heldur ikki at fækka komandi árini, og áhugavert kundi verið at vitað, um Toll og Skatt skal MVG skráseta allan Silicon Valley fyri, at føroyingar kunnu gerast partur av tí globalu bygdini. Hvussu ætlar man sær at umsita hesa lóggávu, uttan at økja um starvsfólkatalið ella áleggja føroyska skattgjaldarnum orímiligar skyldur?

Hveði ikki verið nógv rættari at umhugsað, um loftvegis tænastur ikki áttu at verið frítiknar fyri MVG? Nógv verður tosað um, hvussu vit føroyingar skulu granska og hvussu KT vinnan kann gerast eitt alternativ til verandi vinnur. Um man innibyrgir føroyingar aftanfyri eina ørgrynnu av isolationistiskari lóggávu, ið byggir múrar millum Føroyar og útheimin, so er tosið um eina hátøkniliga framtíð bert tóm orð.

Sporini styggja, tá tað kemur til lóggávu úr Fíggjarmálaráðnum. Kopiering av danskari - í summum førum ótíðarhóskandi danskari - lóggávu er vanligt. Lógirnar verða viðhvørt samtyktar, uttan at tað er gjøgnumhugsað, hvussu hesar lógir skulu umsitast. Broytingar í samtyktu lógunum til fyrimuns fyri borgarar ella feløg vísa seg nærum atlíð at verða sera trekar at fáa ígjøgnum.

Hvørja trygd hava vit fyri, at ein víðkan av MVG innkrevjingini ikki er enn eitt stig skeiva vegin í einari MVG innkrevjingarskipan, ið er alt ov tung umsitingarliga, sum er? Eigur henda samgonga, íroknað Fíggjarmálaráðharran, ikki í verki at vísa, at hon meinar nakað við føgru orðini um gransking og strategiskar ætlanir um heimsins fremsta samfelag innan tøkni? Er stundin ikki komin at tveita trongu skógvarnar burtur?

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Rætting

Tíverri varð Lena L. Mohr skeivt endurgivin í greinini Óhóskandi fyri listasnobbar, sum snúði seg um hugnakvøldið í Ribarhúsi í Fuglafirði, og sum var í blaðnum 3. februar. Hon varð endurgivin fyri at siga, at tað er list, tá ið vit lata okkum í okkara yndis cowboybuksir, tá ið vit hanga júst hasa lampuna upp í stovuni ella tá ið vit prenta vakrar myndir á okkara ferðavinnufaldarar.

Hetta var ein misskiljing. Tað, Lena L. Mohr segði, var, at vit menniskju hava í dag ein grundleggjandi tørv á at definera okkum í mun til onnur. Og tað brúka vit millum annað listina til. Hvørjar bøkur vit velja at lesa og hava í bókreolini, hvørjar málningar vit hanga á veggin, hvønn tónleik okkum dámar er alt við til at siga nakað um hvønn einstakan av okkum í mun til onnur menniskju, men eisini nakað um okkum sum føroyingar í mun til aðrar tjóðir. Í so máta brúka vit listina eins og vit brúka klæðir og aðrar brúklutir.

Eg biði Lenu L. Mohr vinarliga umbera meg fyri hetta mistak.

**Anna V. Ellingsgaard.**

# Hava fólk longu gloymt oljulygnina?

**Virgar T. Dalsgaard**



Til síðsta fólkatingsval komu feðgarnir Hoydal beint upp undir valið við eini feitari tjóðveldislygn! Teir fortaldu, at olja, sum kundi framleiðast, var funnin! - Hetta var kolasvørt lygn, sum seinni er skjalprógvað, men tað gjørdi, at Høgni "stjól" sessin frá antin javnaðar- ella fólkaflokkinum og við neyð og deyð slapp sær inn um danska fólkatingsgátt, har hann so fegin og pengagrískur vil sita og hugna sær!

Okkara umboðssessur er vulgariseraður hesa setuna av Høgna og Sjúrða – teir hava brúkt sessin til beinleiðis spølni og uttan nakað mandat frá veljarunum hava teir ikki skammast fyri at allierað seg við tær mest ódemokratisku drápsmannarørslurnar í Europu. – (minnast fólk ikki Sardiniensfundin?)!

Ei undur í, at sjálvur næsti maður hansara, harra Tòrbjørn Jacobsen fleiri ferðir hevur sagt, at Høgni Hoydal manipulerar og hartil er størsti lygnari, sum nakrantíð hevur verið í føroyskum politikki!

Er slíkur patologiskur lygnari verdugur at velja sum okkara umboð á danatingi?

# Føroyar, ES og Fólkatingssessurin

**Helena Dam á Neystabø**
*Javnaðarflokkurin*




Skjótt skulu øll limalondini í ES taka støðu til ta nýggju ES-grundlógini.

Tá ið Danmark hevur sagt ja til hesa grundlóg merkir tað samstundis, at danskur sjálvsavgerðarrættur verður fluttur úr Danmark og til ES. Uppi í hesum danska sjálvsavgerðarrætti hongur sjálvandi eisini føroyskur sjálvsavgerðarrættur, tí ríkismálini verja, ríkisborgaraskapur, gjaldoyra, rættarmál og onnur mál verða flutt til ES, tá ið tann nýggja grundlógin kemur í gildi.

Í løtuni hava okkara fólkatingsumboð beinleiðis ávirkan á ta viðgerð, sum fer fram í Fólkatinginum, tá ið ES-grundlógin og føroysku ríkismálini og uttanríkismálini koma til viðgerðar har.

Ongantíð áður hevur ta tí verið meiri neyðugt, at føroysku fólkatingsumboðini eru á varðhaldi, og at tey brúka sín møguleika at ávirka og samstarva soleiðis at málini og heimildirnar, so hvørt sum Danmark letur tey til ES, Føroya vegna, verða tikin heim til Føroyar. Hendir tað ikki - verður tað eitt stórt afturstig.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.